

www.oljan.fo

**Jan Müller** 29 - 01 - 2012

# Iran fer at steðga oljusøluni til ES

Evropeisk oljufeløg, sum eiga olju til góðar í Iran, kunnu missa hana, um iranska tjóðartingið samtykkir at banna øllum útflutningi av ráolju til ES. Tað sigur stjórin í tí almenna iranska oljufelagnum. Ahmad Qalebani sigur við tíðindastovuna Insa, at eitt ES-bann ímóti innflutningi av olju úr Iran fer at raka tey evropeisku oljufeløgini, tá saman um kemur. Iran segði fyri nøkrum døgum síðani, at landið er til reiðar at samráðast um landsins kjarnorkuverkætlanir, og eftirlitsmenn hjá Altjóða Orkustovninum IAEA fóru í dag til Teheran fyri at fáa greiði á støðuni. Nógvir vesturlendskir diplomatar siga, at iranska tilboðið um samráðingar er einki annað enn ein roynd at draga málið út, og diplomatarnir siga seg ivast stórliga í, at Iran veruliga er sinnað at samráðast. Altjóða Orkustovnurin segði fyri stuttum, at Iran er í ferð við at ríka uran á kjarnorkuverkinum Fordow, og tað hevur økt spenningin millum Iran og Vesturheimin, sum vil vera við, at Iran ætlar at brúka sína kjarnorku til bumbur. Tað avsanna iranar. Teir siga, at kjarnorkan skal bara brúkast til elorku.